## Kanna vitan um fisk

Í januar vóru granskarar hjá grønlendska náttúrustovninum í Upernavik og bygdunum har um vegir og savnaðu vitan um tey ymsu fislasløgini, sum fiskimenn har á leiðini royna eftir. Vitjanin har er partur av einari størri verkætlan, sum hevur til endamáls at savna vitan um, hvørji fiskasløg eru hvar, og hvussu tey verða troytt í dag. Tilsvarandi kanningar eru gjørdar aðrastaðni í Grønlandi fyrr. Arbeiðið á Upernavik-leiðini hevur samband við, at oljufelagið Cairn hevur fingið loyvi at royndarbora eftir olju í økinum Disko Vestur í summar, sigur kringvarpið KNR.



## Tingaðust um ES

Íslendski uttanríkisráðharrin, Össur Skarphéðinsson, var í gjár í Berlin og tosaði við týska starvsbróður sín, Guido Westerwelle. Eitt høvuðsevni á fundinum var íslendska umsóknin um limaskap í ES, og hvønn stuðul hon kann fáa frá týskum politikarum. Týski uttanríkisráðharrin segði, at týska stjórnin er fegin um umsóknina úr Íslandi, og at ES-nevndin hevur mælt til, at veruligar samráðingar verða tiknar upp um limaskap. Umframt ES-umsóknina umrøddu teir báðir ráðharrarnir handilssamskiftið millum Týskland og Ísland.

# Nú má samgongan skipast av nýggjum

**Samgongan klárar ikki at loysa trupulleikarnar í samfelagnum og tí er neyðugt broytingum, sigur Magni Laksáfoss, tingmaður. Hann heldur, at ein loysn kundi verið at gjørt eitt nýtt samgonguskjal**

SAMGONGUSTEV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hendan samgongan hevur mist trúvirðið og tað er neyðugt við broytingum fyri at koma víðari.

Tað staðfestir Magni Laksáfoss, sum er løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin og sum sostatt eisini er í samgonguni.

Hann hevur nú mist alt álit á, at hendan samgongan megnar at loysa teir stóru trupulleikarnar, sum samfelagið er í.

Nýtt samgonguskjal ella nýtt landstýri

Men hvørjar hesar broytingar skulu vera, er hann ikki heilt sannførdur um enn.

- Men hann staðfestir, at støðan í samfelagnum í dag er heilt grundleggjandi øðrvísi enn hon varð, tá ið samgongan varð skipað.

Tí heldur Magni Laksáfoss, at ein loysn kundi verið at flokkarnir settu seg niður at samráðast um eitt nýtt samgonguskjal, sum leggur upp fyri teimum avbjóðingum, sum standa fyri framman.

Ein annar máti kann verða at skifta landsstýrisfólk út, ella at onkur flokkur í samgonguni verður skiftur út.

- Í Danmark ásannaði Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharri, at nýggja støðan í samfelagnum kravdi broytingar og hann fór so harðliga til verka, at hann broytti tað alllarmesta av stjørnuni, umframt at hann í veruleikanum legði eitt nýtt samgonguskjal fram.

- Okkurt, sum bendir á hendan bógvin kundi eisini verið ein gongd leið hjá okkum, soleiðis sum politiska støðan er í Føroyum í løtuni, heldur Magni Laksáfoss.

- Tann mest dramatiska loysnin er sjálvandi at útskriva nýval og tað er sjálvandi eisini ein møguleiki, men tað er ikki sagt, at tann endaliga loysnin altíð er tann frægasta.

### Álitið og trúvirðið er farið

Magni Laksáfoss vil sostatt ikki gera seg til talsmann fyri, hvørjar broytingar skulu gerast.

Hann vil heldur ikki siga, hvørjar broytingar, hann kundi hugsa sær í landsstýrinum ella í samgonguni og hvørjir flokkar og hvørjir politikarar skulu út og hvørjir skulu inn, skuldi tað komi so langt.

Tað einasta, hann veit, er, at hann dugir ikki at síggja, hvussu landsstýrisfólkini, ið nú sita og tað samgonguskjal, vit nú hava, kunnu loysa samfelagstrupulleikarnar og tí verður neyðugt við broytingum fyri at fáa politiska arbeiðið á glið aftur.

- Eg komi ikki við nøkrum uppskoti, eg nevni bara teir møguleikar sum eru, tí samgongan hevur mist trúvirðið.

- Trúvirðið er farið úti ímillum fólk. Men eisini í sjálvari samgongini hava politikarar mist álitið á, at hendan samgongan er før fyri at loysa trupulleikarnar.

- Í Ólavsøkupakkanum varð lagt upp til, at íløgurnar skuldu hækkast og almenni raksturin lækkast, men tað hendi akkurát tað øvugta.

- Samstundis er inntøkutrygdin enn á fíggjarlógini, pensjónsreformurin er ikki komin enn, langtíðaríløguætlanin er ikki gjørd enn o.s.fr., o.s.fr.



*- Tað er neyðugt við broytingum, tí samgongan hevur mist alt trúvirðið. Ein møguleiki er at gera eitt nýtt samguskjal, men aðrir møguleikar eru at skifta landsstýrisfólk ella at skifta samgonguflokk. Tað einasta, eg veit, er, at onkur broyting má gerast, sigur Magni Laksáfoss*

### Samgongan ikki arbeiðsfør

Magni Laksáfoss staðfestir, at tað sostatt eru nógv tekin um, at samgongan er ikki arbeiðsfør.

Men nú verður aftur og aftur boðað frá, at hetta eru alt mál, sum samgongan arbeiðir við?

- Ja, men tú skalt eisini trúgva upp á, at tað ber á mál. Vit hava arbeitt í níggju mánaðir við einum ólavsøkupakka, sum ikki bar á mál, fyri at nevna eitt dømi.

- Samgongan krevur eitt ávíst trúvirðið fyri at kunna føra politikk, men tað hevur hendan samgongan ikki og tí haldi eg, at politikarar heldur ikki ómaka sær at legga ta heilt stóru orkuna í at finna neyðugu semjurnar.

- Skulu politikarar veruliga fáast at leggja seg í selarnar, er tað ein fortreyt, at teir trúgva upp á projektið, men tað álitið er farið.

- Tí er neyðugt við broytingum, endurtekur hann.

John Johannessen, politiskur formaður í Javnaðarflokkinum, hevur boðað frá, at skal samgonguni verða lív lagað, má hon hava eitt projekt at vera felags um, men tað hevur hann ilt at fáa eygað á í løtuni. Er tað ein staðfesting, tú er samdur í?

- Ja, tað eri eg samdur í og tað havi eg nevnt áður.

Magni Laksáfoss heldur, at trupulleikin er størri í landsstýrinum enn hann er í løgtinginum.

- Seinast, fíggjarlógin var fyri var tað fíggjarnevndin og Løgtingið, sum gjøgnumførdi skerjingar, sum landsstýrið ikki megnaði at loysa, sigur løgtingsmaðurin.